Fram-ÍF 3-0 (25-14, 25-19, 25-18):

Fram aftur fremst

Fremsta lið í meistaradeildini hjá monnum er aftur Fram. Tryggi sigurin móti ÍF leygardagin ger, at teir aftur eru tvey stig frammanfyri SÍ, sum ikki spældi hetta vikuskiftið

FLOGBÓLTUR
Emil Lisberg Jacobsen

Við tí væntaða sigrinum móti ÍF endurvann Fram oddasessin, sum teir í eina viku máttu lata SÍ eiga. Áðrenn dystin leygardagin vóru Fram og SÍ jøvn í stigum og dystum, men sørvingar høvdu betri settmun og vóru tí fremst.

Tí vistu teir í Fram, at einki annað enn ein sigur kundi brúkast leygardagin - ikki minst tí at mótstøðuliðið var ÍF, sum einki av hinum liðunum enn hevur mist stig til.

Og tað skuldi eisini vísa seg, at Fram ikki hevði alt ov nógv stríð av at vinna sín "pliktsigur" móti unga og óroynda ÍF-liðnum. Við settúrslitunum 25-14, 25-19 og 25-18 fekk Fram tey bað neyðugu stigini, og teir kunnu eisini vera nøgdir við, at teir fyri fyrstu ferð í kappingini vunnu ein dyst uttan at missa nakað sett á vegnum.

Næsta vikuskifti hava teir frí, og so er lokaluppgerðin móti Fleyr á skránni.

ÍF er enn uttan stig, men teir fáa ein nýggjan møguleika á heimavølli móti Mjølni komandi leygardag.

Heldur ikki hesa ferð eydnaðist fuglfirðingum at fáa stig
Mynd: Álvur Haraldsen

ÍF-TB 1-3 (29-27, 21-25, 10-25, 9-25):

Sum dagur og nátt

Tað var stórur munur á tveimum teimum fyrstu settunum og so tveimum teimum næstu, tá TB vann 3-1 móti ÍF á Kambsdali

FLOGBÓLTUR
Emil Lisberg Jacobsen

Fýra sett skuldu til fyri at finna vinnaran av dystinum millum ÍF og TB leygardagin. Og hetta bleiv ein rættiliga løgin dystur, tí tvey tey fyrstu settini vóru púra øðrvísi enn tvey tey síðstu.

Fyri at siga tað stutt, so vann ÍF fyrsta sett og kundi tað sama eisini vunnið tað næsta, meðan TB átti tvey tey síðstu settini við húð og hár.

Í fyrsta setti spældu bæði liðini sera væl, og hetta bleiv eisini tað javnasta settið í dystinum. Heili 29-27 endaði hetta settið, sum ÍF vann.

Í næsta setti høvdu vertirnir úr Fuglafirði oddaliðið TB á knønunum. Støðan var 19-15 til ÍF, og tað var góður møguleiki fyri, at tær fóru at vinna hetta settið eisini. Men so tók TB time-out, og tað kom eisini væl við hjá teimum, tí aftaná tað vendi dysturin.

Frá at vera aftanfyri 15-19 stríddu TB-kvinnurnar seg upp á javnt aftur, fóru síðani framum og vunnu settið 25-21.

Avsmurningur

Og nú fóru liðini hvør sín veg. Serliga hjá ÍF fór tað at ganga heilt av skriðuni, og restina av dystinum vórðu tær snøgt sagt hølvaðar av.

TB-kvinnurnar dugdu sera væl at leggja servurnar har, sum ÍF helst ikki vildi hava tær, og suðuroyarliðið vann tvey tey næstu settini so trygt sum 25-10 og 25-9, og so bleiv tað í síðsta enda ein rættiliga tryggur sigur hóast alt.

Við hesum vann TB móti liðnum, sum var nummar tvey, og sigurin tryggjaði eisini, at tær eru fremst, tá fyrra helvt av kappingini er liðug.

ÍF-kvinnurnar noyddust at ásanna, at tá tað liggur væl fyri, kunnu tær gott kunnu spæla upp móti TB. Men tað lá ikki nóg væl fyri allan dystin, og tað bleiv avgerandi.

Við sigrinum á ÍF hevur TB longu tryggjað sær fremsta sessin í fyrru kappingarhálvu
Mynd: Álvur Haraldsen

Mjølnir-Fleyr 2-3 (25-15, 22-25, 15-25, 25-18, 13-15):

Fleyr segði takk fyri síðst

Fyrr í ár vann Mjølnir í Havn móti Fleyr, men leygardagin var tað Fleyr, sum vann tvey týdningarmikil stig í Klaksvík

FLOGBÓLTUR
Emil Lisberg Jacobsen

Eftir at Mjølnir fyrr í ár vann móti Fleyr í Havn, eydnaðist tað leygardagin Fleyr at siga takk fyri seinast við at vinna 3-2 móti Mjølni í Klaksvík.

Um dystin er annars at siga, at hann var meira spennandi enn hann var væl leiktur. Mjølnir byrjaði væl og vann fyrsta sett 25-15, áðrenn Fleyr kom aftur í aftur og vann tvey tey næstu 25-22 og 25-15. Nú var tað síðsta útkall hjá Mjølni, og tað eydnaðist teimum eisini at vinna fjórða sett 25-18 og soleiðis fáa eitt fimta sett.

Hetta síðsta settið bleiv rættiliga spennandi. Mjølnir byrjaði best, men Fleyr menti seg, og tá liðini skiftu síðu, var støðan 8-7 til havnarliðið.

Teir megnaðu eisini at halda hesa leiðsluna. Teir komu á odda 14-10 og fingu sostatt fýra dystarbóltar. Mjølnir kláraði at bjarga trimum av hesum, men fjórðu ferð bar ikki til, og so hevði Fleyr vunnið 15-13. Bæði liðini hava í ár havt tað til felags, at spælið ikki er nóg støðugt gjognum ein heilan dyst, og tað sást eisini aftur á vøllinum leygardagin.

Báðir partar høvdu trupulleikar við móttøkunum, og av tí sama endaði nógv av spælinum úti á kantunum.

Tey bæði stigini komu væl við hjá Fleyr í roynd-unum at varðveita sambandið við oddaliðini Fram og SÍ. Nógvir dystir eru eftir enn, og bæði Fleyr og Mjølnir kunnu enn gera seg galdandi í oddinum, men til tað krevst, at avrikini verða meira støðug í endaspælinum, tá øll stigini telja. Og oddaliðini Fram og SÍ munnu heldur ikki hava nakað ímóti, at Fleyr og Mjølnir ikki tikið tvey stig frá hvørjum øðrum.

Mjølnir-Fleyr 3-0 (25-23, 25-14, 26-24):

Nú kenna vit tær aftur

Nú eru avrikini hjá Mjølni farin at líkjast teimum, sum vit hava kent tær fyri tey síðstu mongu árini. Triði sigurin á rað kom í hús leygardagin, men dysturin vísti eisini, at Fleyr ikki skal undirmetast

FLOGBÓLTUR
Emil Lisberg Jacobsen

Byrjanin uppá kappingina var vánaligari, enn hon nakrantíð hevur verið. Men eftir tríggjar ósigrar á rað er tað nú blivið til tríggjar sigrar á rað til kvinnuliðið hjá Mjølni, sum nú aftur er millum bestu liðini í landinum.

Onkur vil kanska halda, at tað hava tær verið alla tíðina, men tað kann ikki dyljast, at liðið hevði stórar trupulleikar at byrja við.Leygardagin var Fleyr á vitjan í Klaksvík, og tær vórðu sendar heim aftur við einum 3-0 tapi. Ikki tí, úrslitið 3-0 sigur kanska ikki alt um dystin, tí tvey av settunum vóru ógvuliga tøtt.

Tað fyrsta endaði 25-23. Í tí næsta var munurin størri, 25-14, men eisini triðja sett bleiv ómetaliga spennandi. Tað vann Mjølnir eisini, men bara 26-24, so hóast Mjølnir sum væntað vann og framvegis nærkast toppinum, so vísti dysturin eisini, at Fleyr ikki skal undirmetast, sjálvt um tær eru aftast í deildini.

Bárður og teir fyrireika seg til Europa Cup

Síðsti dysturin í grundspælinum verður í kvøld, og so gongur leiðin til Europa Cup-kappingina í Sarajevo

FLOGBÓLTUR
Emil Lisberg Jacobsen

Sum vit nevndu í síðstu viku, kann føroyski landsliðsleikarin Bárður Bendix Mikkelsen ikki spæla við felagnum hjá sær, Holte IF, í Europa Cup kappingini, sum verður í næstum.

Men tað merkir sjálvandi ikki, at hann ikki kann hava ein leiklut í fyrireikingunum til Europa Cup. Sunnudagin spældi hann triðja sett, tá Holte vann 3-0 (25-22, 25-17, 25-23) móti DHG Odense á heimavølli.

Dysturin var javnur, men Holte hevði yvirvág alla tíðina og hevði eisini ráð til at royna ymiskt taktiskt sum fyrireiking til Europa Cup.

Næsti dystur hjá Holte verður longu í kvøld í Århus móti Skovbakken. Dysturin er framskundaður orsakað av Europa Cup-luttøkuni hjá Holte komandi vikuskifti. Dysturin móti Skovbakken verður tann seinasti hjá Holte í grundspælinum. Teir hava longu tryggjað sær pláss í endaspælinum.

Støðan áðrenn seinasta umfar í grundspælinum, har seks tey bestu fara víðari í endaspælið, er annars tann, at HIK Aalborg er fremst við 16 stigum, og síðani koma Holte við tólv stigum, Gentofte Volley eisini við tólv stigum, Skovbakken við tígju, DHG Odense og Marienlyst Volley við átta, Middelfart VK við seks, Lyngby Volley við fýra, og niðast eru Bedsted KFUM og BVC Esbjerg við tveimum stigum í part.